# Gevið fólkaflokkinum fingurin og fótin

DAGFINNUR DANBJØRG



»Back too the future« - »Aftureftir til framtíðina« er kós Fólkafloksins. Aftur til ognar- og arbeiðsviðurskiftini í teimum góðu gomlu døgunum, tá rættir fólkafloksmenn áttu alt, ið vert var at eiga: Jørðina, atgongdina til sjógvin, arbeiðsmegina og háls- og hondsrætt yvir øllum livandi. Fuglin kundi fólkið ikki taka, tí bjørgini áttu fólkafloksmenninir, kasta nót kundu teir ikki, tí strondina áttu teir somu, út at rógva sluppu teir ikki, tí prestar og fólkafloksmenninir áttu bátarnar, og húskallarnir høvdu skyldu til at manna nevndu bátar. Við ongari jørð kundu húskallarnir ongan seyð hava, og uttan føði kundu tey ognarleysu ikki giftast og/ella fáa børn. Bert yvirliva sum húskallar í tænastu hjá harrafólkunum. Henda tíðin er hevjað til skíggja av tí illa gitna stavnamanninum í Dagblaðnum, sum ein og hvør kann vissa seg um við at lesa gomul Dagbløð á Landsbókasavninum. Men hevði tað bara verið tað. Teir hava ongantíð gingið inn fyri demokratii í Føroyum. Teir hava hildið og halda seg til eina klanskipan, har politisk, religiøs og familjumessig sambond telja fram um sakligar kvalifikatiónir bæði í almennum privatum høpi. Í privatum høpi kunnu vit einki broyta (men leggja oss tað betri í minni) men í almennum høpi eigur broyting gjøgnum alment innlit at verða framd, so at klansetanir og tillutingar verða steðgaðar, og soleiðis at øll fáa somu møguleikar. Fólkafloksins skattaskipan eigur eisiniat fáa eitt skot fyri bógvin. Hvat líkist tað, at nøkur - við høgum inntøkum - sleppa undan at gjalda skatt, onnur sleppa sjálv at avgera, hvussu nógv tey skulu gjalda, meðan tey síðstu gjalda fullan skatt av fullari inntøku. Og fyri at tað ikki skal vera lygn, so krevja og fáa tey, ið sleppa undan skatti - av annars sera høgum inntøkum - mest úr landskassanum, meðan tey, ið gjalda mest - av lágum almennum lønum - fáa minst úr sama kassa. Og hetta hevur verið kent í mong ár. Tí tá stuðul til lesandi av fyrstan tíð var útgoldin sást beinanvegin, at børnini hjá teimum vælhavandi privatu stóðu í fremstu røð og fingu størstu upphæddir, tí for eldrini bert guldu hundaskatt. Tá ónøgdin gjørdust nóg stór, og órætturin varð eyðsýndur, fingu fólkafloksmenn forðað fyri eini loysn, har breiðastu herðar skuldu bera tyngstu byrðar, og fingu lirkað uppskot um, at øll skuldu fáa tað sama. Tað sær gott út, men verunleikin er tann, at skulu øll fáa líka, so merkir tað, at øll skulu fáa ólíka, tí tey eru ólíka: Tann, ið nýtist mest eigur at fáa mest, meðan honum, ið nýtist minst eigur at fáa minst. Men ein fyritreyt fyri, at rætt verður stuðlað, hevur verið og er, at TAKS hevur eitt effektivt eftirlit, men eitt tílíkt hevur Fólkaflokkurin altíð forað fyri. Og tí er skilið, sum tað er.

Og nú ætla teir at lata fólkafloksmonnum landsjørðina og alt tað, ið svimur í havinum. Eydnast tað teimum, so hava teir megnað at skrúa tíðina aftur við umleið 200 árum, og vit gerast aftur húskallar í fólkafloksparadísinum bert á einum hægri fíggjarligum støði. Annars síggja teir helst bíligar útlendskar húskallar í vinnuni, meðan tey við innføðingarrættinum antin mugu niður í løn ella flyta av landinum. Nógvir fólkafloksmenn hava longu sum er mánaðarlønir, sum svara til árslønir hjá øðrum. Og teirra vinningsbýti eru á svimlandi og óskiljandi støði.

Fólksins ognir eru stolnar og verða veðsettar fyri milliónaupphæddir. Hvat mundu fólkafloksmenninir sagt, um onkur av okkum veðsetti hús teirra fyri milliónaupphæddir. Strámenn hava eisini gjørt entré í fiskivinnuni og spæla matador við okkara ognum, og tað sigst, at ein klaksvíkingur eigur trý fiskiloyviloyvi, men onki skip. Er tað so, so eru vit langt úti á eggini. Men okkum nýtist ikki at lata fólkaflokksfólk koyra okkum útav, eins og í gomlum døgum. Væl vita vit, at tað eru kriminellar gerðir, ið framdar verða BÆÐI SO OG SO, og tí er einasta gongda leiðin at seta teimum stólum fyri durum - jú fyrr - jú betur, tí minni verður skaðin, sum longu er stórur nokk Men ein avgerandi fyritreyt er, at allar hinir flokkarnir á tingi útskriva val at seta Hin føroyska Fólkaflokkin, og øll tey, ið fremja fólkafloksgerðir, uttan fyri alla politiska ávirkan komandi 10 árini, meðan teir stovnseta:

- eitt grundleggjandi demokrati (einki klanvirksemi)
- rættvís ognarviðurskifti í vinnuni (fólksins ognir)
- rættvís skattaviðurskifti við effektivum eftirliti
- javnrættindi
- arbeiði til allar hendur
- eitt gott samfelag fyri øll
- eitt gott, rættvíst og sjálvberandi demokratiskt Føroyar

Fólkaflokkurin og teirra viðspælarar kunnu so brúka tíðina upp á at loysa tey fólkapolitisketisku málini um at fáa sær ein lítlan - (prosentir og sløg) og/ella fáa sær eitt lítið: frá hvørjum? við ella uttan hít? aftanella frammanífrá? Soleiðis kunnu teir fáa tíð til at loysa hesar til allar tíðir grundleggjandi spurningar. Teir kunnu kanska taka støði í Nóa og døtrunum ella Dávid og Batseba, har er nokk at taka av. Skaðin gerst harvið minimalur fyri okkum, ið elska landið og ynskja at liva her sum javnsettir føroyingar í Føroyum.

Annars verður ynskt øllum lesarunum eini góð og hugnalig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

# Einar frælsar, grønar, javnar og skapandi Føroyar

HØGNI HOYDAL



**Aftur í ár fer fíggjarlógin og øll politiska dagsskráin at gerast eitt tilvildarligt úrslit av skiftandi valdsdystum innanvert samgonguflokkarnar. Men tað finst bert ein leið at fáa skil á búskapin og at skapa einar mennandi og sjálvbjargnar: Langtíðarmál og álit, ið verða sett og hildin**

Vit venja okkum alt ov lætt við tað. Politisku málini fyri framtíðina drukna í valdsdystum og teirri sonevndu “telvingini”. Nú skákar ein her í samgonguni. Tá leypir annar um borg. Onkur rókur ella bispur leypir sjálvir av borðinum. Og soleiðis fer øll dagsskráin, politiska orkan og fjølmiðlaviðgerðin. Hvør roynir í sínum lagi at flyta ein leik í dag, sum fær áhugan at venda sín veg, inntil næsti leikur er fluttur.

Og tað einasta, ið millum manna verjir hesa gongd, er grundgevingin um, at tað finst onki alternativ(!). Men sjálvandi finnast alternativ. Eitthvørt alternativ er í veruleikanum í frægari enn vantandi stjórningin í løtuni. Tí hon máar alt sjálvsálit burtur og skapar djúpa líkasælu kring seg. Øll mál og trupulleikar, ið stinga seg upp, verða vend til misálit á okkum sjálv sum fólk, heldur enn til loysnir, ið hava eitt mál og mið. Og tað kostar okkum í veruleikanum nógv meira enn vantandi fíggjarstýringin.

**Vit skulu megna tað**

Okkum tørvar eina stjórn og eina politiska leiðslu, sum bindur seg til at seta greið langtíðarmál og at halda seg til grundleggjandi prinsipp og hugsjónir í sínum arbeiði. Okkum tørvar eina stjórn, ið sigur: Vit fara sum samfelag og fólk at megna at vinna á trupulleikunum, og tað gerst ikki við at reka “frá hondini í munnin-politikk”.

Vit hava lært av søguni og seinastu árunum – og altjóða fíggjarkreppan hevur prógvað tað um allan heim – at bráðvøkstur og bráðstøðgur skapar onga javnvág og langtíðarmenning. Men bert sosialan ójavna og tilvild. Vit kunnu ikki dúva uppá virðir og tilfeingi, ið ikki kunnu endurnýggjast, og sum ikki hava veruligt skapandi virksemi aftanfyri seg. Har vit bert kappast um at fáa fatur á blokki, lánum ella peningi, ið so flytast ímillum geirar, fyritøkur og fólk. Okkara avbjóðing at venda hallinum í landsbúskapinum, er júst sama avbjóðing sum at gera okkum leys av blokkstuðli og at umsita okkara náttúru- og menniskjaliga tilfeingi. Og við eini langtíðarætlan skulu vit sjálvsagt skapa álit á, at vit megna tað.

**Úr tilvildartelving til langtíðarmál**

Okkara boð um eitt greitt alternativ kann í fyrsta umfari setast upp í hesi langtíðarmál og lyfti um, hvussu vit vilja arbeiða. Víðsjón okkara er: Einar frælsar, grønar, javnar og skapandi Føroyar.

Føroyar skulu gerast ein grønur miðdepil í Norðuratlantshavi, sum megnar at umsita tað ovurstóra náttúrutilfeingið, ið vit eiga, burðardygt - og megnar at gagnnýta og leggja um til varðandi orkukeldur

Ein fiskivinnureformur verður framdur við uppskotinum hjá Tjóðveldi um tilfeingisbúð sum grundarlagi.

Ikki varðandi inntøkur og eingangsinntøkur skulu í Búskapargrunn, har avkastið verður nýtt til framtíðaríløgur.

Vinnupolitikkurin skal skapa javnar kappingartreytir millum nýggjar og verandi vinnur og eggja til íverksetan.

Altjóða universitet, gransking, útbúgving og mentan eru fremsta íleguøkið komandi 10-15 árini. Annað er okkara altjóða infrakervi út í heim við flogvølli, tele- og orkusamskifti, heilsusamstarvi við okkara grannalond, handilsavtalum og altjóða samstarvi á øllum týðandi økjum.

Føroyingar samtykkja egna grundlóg og taka á fólkaatkvøðu avgerð um at skipa seg sum sjálvstøðugt land – og hetta er fortreytin fyri at fremja settu málini. Annars kunnu vit sita og togast í 20-30 ár afturat, har vit hvørki eru fuglur ella fiskur í heiminum og skeldast um, hvør skal fíggja okkara lív og vælferð.

Ongin fíggjarlóg verður samtykt uttan at hon hevur eina greiða langtíðarætlan fyri raksturin av hvørjum málsøki sær – t.e. at hvørt játtanarøki skal minka ella vaksa so og so nógv næstu 10 árini.

Rættartrygd og rættindini hjá sosialt og fíggjarliga veikastu samfelagsbólkunum eru fremsta ýtið í at endurskoða almennu sosial- og heilsuskipanirnar.

Ongin størri íløga verður samtykt uttan so, at hon er partur av langtíðarætlan, ið røkkur minst 10 og helst 15 ár fram.

Ongi mál verða skrumblað ígjøgnum samgongur og ting. Øll mál skulu hava veruliga fólkaræðisliga viðgerð og øll saklig atlit lýsast.

# Vegaførin í Leirvík

JÓHAN CHRISTIANSEN
Borgarstjóri



**Fyrst ein rættleiðing til tíðindini á døgurða 9. desember**

Lurtarin kundi fáa ta fatan av tíðindunum, at onki spurdist burtur úr fundunum við Javnaðarflokkin, Sambandið og Fólkaflokkin, tann 8. des.

Hetta er als ikki rætt. Vit fóru suður á fund við einum greiðum boðskapi. Nevnuliga, at leirvíkingar skulu ikki vera verri stillaðir við kommunalum tænastum orsaka einum nýggjum landsvegi, enn teir eru í dag. Tvs. at tað sum skattagjaldarin í Leirvík hevur rindað fyri, og verður burtur um fyriliggjandi ætlan, uttan tillagingar, verður gjøgnumførd, **skal endurskapast**.

Annar boðskapurin var, at tað er **bert** løgtingið, ið kann loysa trupulleikan við vegaføringini í Leirvík.

**Støðan í dag**

Samtykta lógin um vegaføring í Leirvík kann ikki gjøgnumførast. Orsøkin er tann, at í lógini er eitt hægstamark fyri kostnaðinum av vegaføringini, nevnuliga 40 mió. kr.

Sum tað sær út í løtuni, so fær man í tí stóra heila **bert ein veg**. Tvs. at 40 mió. kr. røkka ikki til tey uml. 50 parkeringsplássini, kommunan missir. Penganir røkka ikki til at gera nýggjar atkomur til tey sethús, ið missa sína atkomu, og fleiri onnur viðurskiftir. Men til seinast, og ikki minst, so missa leirvíkingar bátahylin, og fáa ongan nýggja aftur.

**Tit lesa rætt**. Bátahylurin verður lagdur undir nýggja vegin, og tað eru ikki pengar til at gera ein nýggja afturfyri.

Føroya Løgting og Føroya fólk mugu skilja, at vit sum kommuna ikki kunna góðtaka, at okkara borgara mugu rinda tvær fer fyri tí tænastur, tí ein landsvegur tekur verandi.